KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

# Leiðbeining til brúkaran av bussinum hjá Serflutningsskipan Landsins í Klaksvíkar Kommunu

*Endamálið við Serflutningsskipan Landsins er at veita flutningsmøguleika til fólk, ið bera brek og eru so tarnað, at tey ikki kunnu nýta onnur flutningstól ella í avmarkaða tíð, vegna sjúku ella skaða, hava henda tørv.*

Soleiðis verður søkt um loyvi at koyra við bussinum hjá Serflutningsskipanini:

1. Umsóknarblað fæst við at venda sær til Klaksvíkar Kommunu – Miðlan tlf. 410000, eisini kann ein taka niður umsóknarblað av heimasíðuni hjá Klaksvíkar Kommunu, www.klaksvik.fo.
2. Klaksvíkar Kommuna góðkennir brúkaran og skrivar út loyvið at nýta bussin.
3. Bussførarin koyrir og hjálpir fólki, ið eru til reiðar innan fyri úthurðina, í og úr bussinum. Har tað er neyðugt, kann brúkarin taka hjálparfólk við ókeypis.
4. Bussurin koyrir millum kl. 8.30 og 16.30 allar yrkadagar. Túrar í hesum tíðarskeiðinum verða bílagdir hjá bussføraranum á tlf. 212288.
5. Um kvøldið og í vikuskiftunum er møguleiki hjá fólki, ið bera brek og eru so tarnað, at tey ikki kunnu nýta onnur flutiningstól, at nýta bussin sum hýruvogn. Gjaldið fyri hesar túrar er sum fyri vanligan hýruvogn. Túrar uttanfyri arbeiðstíð skulu verða umbidnir áðrenn kl. 15.30 og til vikuskifti áðrenn kl. 15.30 fríggjadag og hetta verður gjørt við at venda sær til Miðlan, tlf. 410000.
6. Brúkarin keypir 10-ferðakort á kr. 100,- frá Klaksvíkar Kommunu. Brúkarin **skal** hava 10-ferða kortið við tá hann nýtir serflutningsbussin.
7. Fólk úr aðrari kommunu, ið eru góðkendir brúkarar av Serflutningsskipan Landsins, og sum eru stødd í Klaksvík, kunnu nýta bussin hjá Serflutningsskipanini í Klaksvík.
8. Bussurin hevur summarfrí í fýra samanhangandi vikur í juli/august. Nærri verður lýst á heimasíðuni, www.klaksvik.fo

Tey, ið ynskja aðrar upplýsingar um serflutningsbussin, kunnu venda sær til Klaksvíkar Kommunu – Miðlan tlf 410000.